**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 91/2017: Uppskot til samtyktar um bygging av kampus og akademiskum vitanardepli**

Magni Laksáfoss, løgtingsmaður, hevur vegna Sambandsflokkin lagt málið fram 27. februar 2018 og eftir 1. viðgerð 6. mars er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum 7. mars og 3. og 4. apríl.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við Vinnuhúsið, Landsbókasavnið og landsstýrismannin í mentamálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Hanna Jensen, Kristianna W. Poulsen, Óluva Klettskarð, Katrin Kallsberg og Jónleif Johannesen) heldur, at uppskotið er gott, og at tað er gagnligt, at løgtingið samtykkir, at lestrarbýur skal fyrireikast. Avbjóðingarnar við aldurs- og kynsbýti í Føroyum skulu framhaldandi havast í huga, og íløgur í útbúgving og betri lestrarumstøður skapa størri trivnaðarmøguleikar fyri ung og barnafamiljur.
Landsstýrismaðurin á økinum setti í 2015 ein kampusbólk, sum læt úr hondum eina frágreiðing í juni 2016. Framløga var í læraraskúlahøllini á Frælsinum á sumri 2016. Ein nýsettur bólkur er eisini farin til verka í ár fyri at lýsa og loysa hølisavbjóðingarnar hjá Setrinum her og nú og nøkta bráðfeingis tørvin, so at gerandisdagurin hjá starvsfólki og lesandi kann betrast. Men ikki minst ger arbeiðsbólkurin eitt víðfevnt arbeiði við eini strategiskari ætlan fyri ein lestrarbý.
Fróðskaparsetur Føroya er stovnað í 1965 og er eitt rættiliga ungt universitet í mun til universitet, vit kenna úr grannalondum. Vit kunnu t.d. samanbera við Københavns Universitet, sum mong føroysk lesandi ganga á, sum varð stovnað í 1479. Tey, sum kenna gomlu universitetini í m.a. høvuðsstøðunum í Evropa, vita eisini, at sjálvt har eru hølisviðurskifti kendar avbjóðingar.
Tað er eitt gott hugskot at savna virksemið hjá Fróðskaparsetri Føroya á einum hóskandi øki í høvuðsstaðnum, og tí verður arbeitt við hesum. Partur av kjakinum hjá núsitandi samgongu er júst hetta, at søvn og aðrir vitanarstovnar heilt ella lutvíst kunnu knýtast at økinum. Hetta uppskot til samtyktar leggur samstundis dent á vitanartungar vinnur. Undir hoyringini er komið fram, at tað er í samsvari við virksemið og ætlanirnar hjá Setrinum, at vinnulig umhvørvi hava gott samstarv við lærustovnin og hava møguleika at verða betur knýtt at Setrinum. Harafturat er týdningarmikið, at bústaðarviðurskifti og tílík trivnaðarviðurskifti eru partur av ætlanini. Eisini kom fram, at ein savning av Fróðskaparsetri Føroya í eitt kampusøki fer at virka sum savnandi eind fyri deildir, ið møguliga koma úti um landið.

Tað er týdningarmikið, at karmar um Fróðskaparsetur Føroya og ein veruligur lestrarbýur, sum sømir seg Føroyum, fáa veruliga raðfesting á langtíðar íløgukarminum hjá landinum, so at vit um eitt styttri áramál, hægst 10 ár, hava júst tað, vit í dag ynskja okkum, og sum kampusbólkurin skal fyrireika og leggja fram ætlan um. Tað hevur eisini týdning, at ein tílík verkætlan kann vera klár at seta í gongd sum konjunkturjavnandi politiskt amboð, um nógva byggivirksemið, vit síggja beint nú, minkar.
Meirilutin tekur tí undir við ætlanunum í uppskotinum og setur fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

"Løgtingið heitir á landsstýrið í fyrireikingararbeiði sínum at savna og byggja kampusøki, Fróðskaparsetur Føroya, at leggja fram frágreiðing, sum eisini lýsir, hvussu mentanarstovnar, bústaðarviðurskifti og annað vitanarvirksemi kann verða knýtt at kampusøkinum og fyrireika lógaruppskot."

Við hesum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Jógvan á Lakjuni og Bjørn Kalsø) vísur á, at landsstýrismaðurin í mentamálum arbeiðir við einari strategiskari ætlan um, hvussu kampusøki, Fróðskaparsetur Føroya, skal skipast frameftir. Henda ætlan verður ætlandi løgd fram seinni í ár. Minnilutin mælir landsstýrismanninum til at taka skipan av deildum (fakultetum) undir Fróðskaparsetrinum við hóskandi hægri útbúgvingum kring landið við í arbeiðið. Minnilutin sær tí onga grund til at samtykkja uppskotið, og fer minnilutin tí at mæla Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Mentanarnevndin, 19. apríl 2018**

Hanna Jensen
formaður

Óluva Klettskarð
næstformaður

Kristianna W. Poulsen

Katrin Kallsberg

Jónleif Johannesen

Jógvan á Lakjuni

Bjørn Kalsø